# Útbyggingin av Tofta skúla kostar 43,8 mió. krónur


*Ætlandi stendur Tofta skúli útbygdur um tvey ár*

Mynd: Vilmund Jacobsen

**Tað siga tølini, nú tilboðini eru innkomin, og sáttmálarnir við arbeiðstakararnar eru undirskrivaðir**

ÚTBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nes kommuna er farin í holt við stórar útbyggingar á skúlaøkinum. Talan er um útbyggingar og umbyggingar av Tofta skúla fyri tilsamans 43,8 milj. krónur.

Formaðurin í teknisku nevnd, Súni í Hjøllum, sigur, at kommunan í drúgva tíð hevur arbeitt við ætlanunum um at útbyggja skúlan.

– Fyrsta projektið varð lagt fram í 1990, og síðan hava ymiskar ætlanir ligið á borðinum.

Hann sigur, at av ymiskum orsøkum – og serliga av peningaligum orsøkum, hevur áður ikki verið møguligt at framt ætlanina í verki.

– Undanfarna bygdaráð setti aftur ferð á málið, og setti eitt nú gongd á lendisarbeiði, sum felagið, Falkon í Saltnesi, hevur gjørt.

Súni sigur, at sitandi bygdaráð nú einmælt hevur samtykt at fremja skúlaútbyggingarætlanina.

Tað er arkitektafelagið hjá Alberti Isfeld og Gudmundi S. Hansen, sum hevur teknað og projekterað skúlaútbyggingina.

### Sáttmálarnir

Súni í Hjøllum sigur, at fyrireikingarnar til útbyggingina hava verið rættiliga nógvar og drúgvar, tí neyðugt hevur verið fleiri ferðir at broyta og skerja ætlanina, soleiðis at kommunan fíggjarliga er før fyri at fremja hana.

Arbeiðið hevur verið boðið út í almenari lisitatión, og í seinastu viku vórðu sáttmálarnir við arbeiðstakararnar undirskrivaðir.

**Búsetur & Lützen:** Jørð,- kloakk-, betong-, stál-, timbur-og snikkaraarbeiði.
**Regin Joensen:** Múraraarbeiði.
**Demich**: HVS, ventilatión v.m.
**Kongshavnar El-virki:** El-arbeiði.
**Falkenberg, múrarameistari:** Málaraarbeiði.
**Eyðun Eyðunsson:** Gólváleggingararbeiði.

### 43, 8 mió. kr.

Formaðurin í teknisku nevnd sigur, at tilsamans verður kostnaðurin av arbeiðnum 43,8 milj. krónur fyri tað, sum Nes kommuna í hesum umfari ætlar at byggja út fyri.

– Sambært ætlanini verður henda útbygging liðug á vári 2008, sigur Súni í Hjøllum.

# Eitt ógvuliga tungt tak




*Umleið 1250 fólk búgva í Nes kommunu. Fleiri skip og bátar hoyra til bygdina, og nógv vinnuvirksemið er á havnalagnum. Formaður í teknisku nevnd hjá kommununi er Súni í Hjøllum*

Mynd: Vilmund Jacobsen

**Skattainntøkan hjá Nes kommunu liggur um 26 mió. krónur um árið, og í kommununi vóna tey, at pláss eisini verður fyri at fremja onnur spennandi og alneyðug arbeiði, nú farið er undir kostnaðarmikla skúlabygging**

ÚTBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nes kommuna hevur í fleiri ár sett pening av til skúlaútbyggingina, men neyðugt verður seinni at taka lán.

– Hetta er sjálvandi eitt ógvuliga tungt tak hjá kommununi, men við verandi skattainntøku, sum liggur um stívliga 26 mió. krónur um árið, halda vit íløguna vera forsvarliga, sigur formaðurin í teknisku nevnd í Nes kommunu, Súni í Hjøllum.

### Onnur arbeiði

Hann sigur, at hóast ein stórur partur av fíggjarorkuni hjá kommununi tey fyrstu árini fer til skúlabyggingina, vóna tey, at pláss eisini verður fyri øðrum spennandi og alneyðugum arbeiðum tey komandi árini.

Í Nes kommunu búgva umleið 1250 fólk, skattaprosentið er 20,5, og barnafrádrátturin er 4.500 krónur.


*Krúnborg á Fuglafirði við 3.043 tonsum av svartkjafti*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Havsbrún keypir nógvan svartkjaft

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin lá Krúnborg á Fuglafirði við 3.043 tonsum av svartkjafti, sum teir hava fingið í altjóða sjógvi á Rock All-leiðini.

Sama dag kom eisini írska skipið Antarctic á Fuglafjørð við sløkum 1600 tonsum av svartkjafti. Ein annar íri, Vigilant, er eisini á veg hendanvegin.

Í kvøld kemur Finnur Fríði og í annaðkvøld Jupiter, báðir við svartkjafti.

Á Havsbrún siga tey, at okkurt er í ólagi á virkinum í Kilybegs í Írlandi, og tað er orsøkin til, at írskir og skotskir bátar hava stevnt til Føroya og Íslands at landa um dagarnar.

Virkið í Kilybegs kann undir vanligum umstøðum taka ímóti eini 800 tonsum um døgnið, meðan kapasiteturin hjá Havsbrún táttar í 2.000 tons um døgnið.

Christian í Grótinum er í løtuni á veg til Vestmannaoyggjarnar at landa.

Saksaberg og Høgaberg eru framvegis á lodnuveiði undir Íslandi. Teir byrjaðu seinni har yviri enn hini føroysku skipini.